# Skulu 12 ár í arbeiðslegu

Ein dómstólur í Norðurkorea dømdi í morgun tvær amerikanskar tíðindakvinnur at arbeiða tólv ár í einari arbeiðslegu fyri fíggindaligt virksemi, sum tað eitur í dóminum. Tær báðar kvinnurnar, Laura Ling og Euna Lee, vórðu handtiknar tann 17. mars á markinum millum Norðurkorea og Kina, har tær arbeiddu við tíðindum um norðurkoreanar, sum flýggja til Kina. Norðurkoreanska ákæruvaldið hevur fyrr sagt, at kvinnurnar vóru komnar inn um markið uttan loyvi, og at tær høvdu útint fíggindaligt virksemi. Tær kunnu ikki kæra dómin, tí hann er endaligur, skrivar Reuters.





# Aftur í Washington

Amerikanski forsetin, Barack Obama, kom í gjárkvøldið aftur til Washington eftir at hava verið á vitjan í Miðeystri og í Evropa. Í Miðeystri vitjaði hann Saudiarabia og Egyptaland. Endamálið við ferðini hagar var at linna spenningin millum USA og tann muslimska heimin, og í Kairo helt Obama røðu fyri tí muslimska heiminum. Í Evropa vitjaði Obama Týskland og Frakland, har hann millum annað var til 65 ára minningarhald fyri landgongdina hjá teimum sameindu í Norðurfraklandi í juni í 1944.

Jacob Edmund Jacobsen:

# Ársins Truckari 2009



*Jacob Edmund Jacobsen gjørdist eins og í fjør Ársins Truckari*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í ár varð Trucker Festivalurin hildin saman við norðoyastevnuni í Klaksvík.

Trucker Festivalurin hevur verið eitt afturvendandi tiltak síðan 2003, tey fyrstu árini í Runavík og síðan í fjør hevur hann verið hildin í Klaksvík.

Sum vanligt er á Trucker Festivalinum verða ársins bilar kosnir, og ein bilførari verður eisini kosin Ársins Truckari. Eins og í fjør varð Jacob Edmund Jacobsen á Strondum kosin Ársins Truckari.

Í ár var eitt sindur meira gjørt burturúr, t.d. var ein showbilur komin úr Danmark. Talan var um "The Dragon" hjá Carsten Nielsen úr Køge, sum er ein flottur sergjørdur Scania forvognur. Bilurin varð fyrstu ferð avdúkaður, tá festivalurin byrjaði.

Yvir 70 bilar vóru teknaðir til festivalin. Fyrireikararnir, Leif Eliasen og Hugo Skorastein, siga, at tað ongantíð hava verið so nógv fólk til festivalin. Teir halda, at bæði tað at festivalurin var á norðoyastevnu og danski showbilurin gjørdu sítt til, at festivalurin varð so væl vitjaður.

Annars vóru ymisk tiltøk í sambandi við Trucker Festivalin. Leygardagin var bilboksing á Sandinum og sunnudagin sang countrysangarin Hallur Joensen. Ókeypis kaffi var báðar dagarnar at fáa í kassanum á hvíta bilinum hjá Faroe Ship, sum Ársins Truckari koyrir. Bilurin stóð miðskeiðis á festivaløkinum og var innrættaður sum ein café. Eisini var ókeypis suppa og grillmatur at fáa á økinum.

Eftir at ársins bilar vóru kosnir og steypini handað, koyrdu bilarnir í konvoy úr Klaksvík kl. 18.

*mg*




*Fyrireikararnir av Trucker Festivalinum: Leif Eliasen og Hugo Skorastein*

*Mynd: Hans Norðfoss*



*Mynd: Hans Norðfoss/Leif Eliasen*

**Vinnarar av Trucker Festivalinum 2009**

| | |
|---|---|
| Ársins Veteranbilur | Hans Egil Joensen |
| Ársins Forvognur | Kristian Olsen, Hans Marius |
| Ársins Bussur | Askham v.Olivar Askham |
| Ársins Kranabilur | Johannes Rasmussen spf |
| Ársins Ruskbilur | IRF, Karl Sofus í Heimustovu |
| Ársins Lastbilur | Faroe Ship, Ovi G. Joensen |
| Ársins Trailari | Hans Egil Joensen |
| Ársins Skiftilastari | Hans Egil Joensen, Heri Norðhús, Jólfríður Hansen |
| Ársins Dumpari | Faroe Ship, Herálv Jensen |
| Ársins Kassabilur | IRF, Karl Sofus í Heimustovu |
| Ársins Festivalbilur | Articon, Suni |
| Ársins Betongbilur | MAGN, Heini Hansen |
| Ársins Oljubilur | Løvubetong, Theodor |
| Ársins Spesialbilur | The Dragon hjá Carsten Nielsen |
| Ársins Showbilur | |
| Ársins Bilboksari | David Christiansen |
| Ársins Truckari | Jacob Edmund Jacobsen |

Steypini vórðu latin av Tryggingarfelagnum Føroyar.



*Ársins Bilboksari gjørdist David Christiansen*

*Mynd: Hans Norðfoss/Leif Eliasen*



*Pia og Carsten Nielsen vóru komin í Danmark við einum flottum Scania showbili*

*Mynd: Magnus Gunnrsson*